Búskapur og vinna:

## Atkvøða um evruna

Eins og danir og bretar hava sviar ikki tikið evruna í nýtslu, men svenski forsætisráðharrin, Göran Persson, sigur nú, at fólkaatkvøða verður kanska um spurningin longu næsta ár.

Við svensku tíðindastovuna TT sigur Göran Persson seg vænta, at fólkaatkvøðan verður í 2003, men hann vil ikki seta dag á. Formaðurin í høgraflokkinum Moderatarna hevur skotið upp, at fólkaatkvøðan verður tann 17. november næsta ár.

Meiningakanningar í Svøríki hava víst, at alt fleiri sviar taka undir við, at evran verður gjaldoyra í Svøríki.

## Ikki stuðul beinanvegin

Fær spanska stjórnin sína vilja, kunnu bøndurnir í teimum eysturevropeisku londunum, sum eru á veg inn í ES, ikki vænta at fáa sama stuðul sum teirra starvsfelagar í hinum ES-londunum.

Spania tók á nýggjárinum við formansskapinum í ES, og spanski landbúnaðarmálaráðharrin sigur, at eftir hansara tykki eiga tað at ganga fimm ár, frá tí at londini eystan fyri fáa limaskap, til bøndurnir har fáa sama stuðul sum hinir.

Hugskotið hjá spanska landbúnaðarmálaráðharranum er ikki nýtt, tí ES-nevndin hevur sagt tað sama fyrr, men hon hevur tó ikki nevnt nakað áramál.

UTTAN ÚR HEIMI

# Løgreglan tosaði við flogrænara tveir dagar undan atsóknini

**Tann 9. september steðgaði amerikanska løgreglan einum manni, tí hann koyrdi ov skjótt. Tveir dagar seinni kendi løgreglumaðurin navn hansara aftur**

ÚTLAND
*Eirikur Lindenskov*




*Dagin eftir, tann 11. september, var Ziad S. Jarrah millum teirra, sum rændu flogfar nummar 93 hjá United Airlines*

*Mynd: Reuters*

Í tí leigaða bilinum, sum verður steðgaður hetta kvøldið, situr Ziad S. Jarrah. Um tveir dagar skal hann saman við øðrum ræna flogfar nummar 95, sum skal á flog úr floghavnini í Newark. Løgreglumaðurin Joseph Catalano veit ikki, hvør maðurin er.

Týsdagin vísti løgreglan í statinum Maryland eina filmsupptøku, sum videotólið í løgreglubilinum hjá Joseph Catalano hevði tikið av tilburðinum. Í myrkrinum sæst løgreglumaðurin fara gangandi yvir til tann steðga bilin, og tað sæst, at Joseph Catalano lýsir í andlitið á bilføraranum við lummalyktini.

- Catalano veit merki í, at maðurin var sera róligur, og at hann svaraði tí, sum hin spurdi um. Okkara maður hugdi eisini inn í bil hansara, sum var ógvuliga ruddiligur. Hann sá heldur einki, sum kundi siga tað minsta um tað, sum Jarrah var á veg til, sigur David Mitchell, løgregluleiðari í Maryland.

### Mátti gera tað

Tilburðurin var á motorvegnum I-95, sum gongur fram við amerikansku eystur-strondini heilt úr Florida norður til kanadiska markið. Joseph Catalano hevði eina tráðleysa mikrofon uppi á sær, og á videoupptøkuni ber til at hoyra samrøðuna millum hann og Ziad S. Jarrah. Tað hoyrist, at maðurin svarar stutt, tá løgreglumaðurin spyr.

Joseph Catalano fann einki, sum hann kundi seta fingurin á, men letur tann fremmanda bilføraran vita, at hann fær góðar 2000 krónur í bót, tí hann hevði koyrt 40 kilometrar skjótari, enn hann hevði loyvi til. Síðani setur Catalano seg aftur í løgreglubilin, og Ziad S. Jarrah heldur fram ferðina norður til Newark-floghavnina í New Jersey.

Komin til New Jersey skrivaði hann einari vinkonu í Týsklandi bræv. Hann koyrdi tað í postkassan, men av tí at bústaðurin ikki var nóg fullfíggjaður, kom brævið aftur til USA. Har fingu myndugleikarnir fatur á tí.

- Eg havi gjørt tað, sum eg mátti gera. Tú eigur at vera stolt, tí tað er ein æra. Tú fert at síggja úrslitið, og tá verða øll glað, skal hann hava skrivað í brævinum til vinkonuna.

Dagin eftir, tann 11. september, var Ziad S. Jarrah millum teirra, sum rændu flogfar nummar 93 hjá United Airlines. Tað var tað seinasta flogfarið, sum varð rænt hendan dagin og datt niður í statinum Pennsylvania. Øll, sum vóru umborð, doyðu.

# 6000 menn úr Miðeystri skulu úr USA

**Sambært amerikansku myndugleikunum eru meira enn 300.000 útlendingar í landinum, hóast teirra uppihaldsloyvi eru farin úr gildi**

ÚTLAND
*Árni Joensen*

Amerikansku myndugleikarnir hava í seinastuni skipað fyri einum lýsingarátaki, har tey meira enn 300.000 hava fingið boð um at fara av landinum. Úrslitið hevur ikki verið nóg gott, og tí hava myndugleikarnir nú gjørt av at leita eftir teimum.

Menn úr londum í Miðeystri standa fyrst fyri skotum. Tað kemst av einari avgerð hjá stjórnini, sum sigur, at fólk úr londum, sum kunnu metast at hava samband við altjóða yvirgangsvirksemi, skulu vísast av landinum fyrst. Millum útlendingarnar sum umleið 6000 menn úr londum, sum sambært amerikansku myndugleikunum hýsa legum hjá felagsskapinum al-Qaeda. Og sambært einum talsmanni hjá løgmálaráðnum er framvegis vandi fyri yvirgangsatsóknum í USA.

Nógvir amerikananarar av arabiskum uppruna og felagsskapir, sum virka fyri betri rættindum til innflytarar, hava mótmælt mannagongdini hjá myndugleikunum. Teir siga, at mannagongdin ber bráð av, at Bush-stjórnin ger mun á fólki eftir teirra uppruna.

Nógv tey flestu, sum eru í USA uttan lógligt uppihaldsloyvi, eru í mið- og suðuramerikanskum londum.

Búskapur og vinna:

# Bumba undir donsku laksavinnuni

Tað kann raka danska laksaídnaðin sera meint, at danska tollvaldið er komið eftir, at norskir laksaútflytarar falsa útflutningsskjølini. Meginparturin av norska laksinum, sum kemur til Danmarkar, verður virkaður á virkjum í Norðurjútlandi, og har siga fólk, at avdúkingarnar hjá tollvaldinum eru ein bumba undir ídnaðinum.

Umsetningurin hjá donsku laksavirkjunum liggur um tvær mia. krónur um árið, og umleið 1200 fólk arbeiða í hesari vinnuni.

Sambært felagnum hjá donsku matvøruvirkjunum eru avdúkingarnar enn eitt dømi um, at skipanin við minstaprísi á laksi er miseydnað. Stjórin í felagnum, Ole Linnet Juul, heldur tað vera harmiligt, at tey donsku virkini skulu enda sum syndabukkar, tí norskir útflytarar svika við tølunum.

Úr Norðurlondum:

## Sendu F-16 eftir trolarum

Norska sjóverjan helt seg ikki hava annað í at velja týsdagin enn at senda tvey jagaraflogfør av slagnum F-16 at varskógva tveir trolarar, sum høvdu kós ímóti einum oljupalli í Norðsjónum. Hóast fleiri royndir, bar ikki til at fáa samband við skipini.

Tey bæði flogførini vóru við í einari venjing hjá norska flogvápninum, tá flogskipararnir fingu boð um at seta kós ímóti oljupallinum Sleipner-B, tí tvey ókend fiskifør vóru á veg ímóti trygdarmarkinum kring pallin. Markið er 500 metrar. Samstundis sendi sjóverjan eina tyrlu avstað, og eitt hjálparskip, sum lá hjá einum øðrum oljuballi, fekk eisini boð um at sigla ímóti teimum fremmandu skipunum.

Tað vísti seg, at trolararnir vóru skotskir, og teir broyttu sjálvir kós, áðrenn teir komu inn á trygdarmarkið kring norska pallin.

Norska verjan skipaði eina serliga trygdareind fyri trimum mánaðum síðani, og hetta er fyrstu ferð, at hon hevur verið nýtt.

## Danska passið ikki nóg mikið

Avgerðin hjá amerikansku myndugleikunum at krevja betri eftirlit við útlendingum, sum koma til USA, hevur m. a. við sær, at amerikanararnir nú herða krøvini til ferðafólk úr 29 londum. Talan er um lond, haðani ferðafólk ikki nýtast innferðarloyvi, og Danmark er eitt av hesum londunum.

Sambært amerikanska kravinum er tað ikki longur nóg mikið við tí vanliga passinum. Myndin kann vera góð, men sum skilst ætla amerikanararnir at krevja, at onnur likamlig prógv skulu vera í passinum. Tosað verður um t. d. fingramerki, eygnamynd, arr ella onnur eyðkenni á andlitinum o.s.v.

Amerikansku myndugleikarnir siga, at við upplýsingum sum hesum verður tað munandi lættari at staðfesta, um tann ferðandi er tann, hann ella hon sigur seg vera.

Donsku myndugleikarnir hava fingið boð um tey ætlaðu amerikansku stigini, men enn er ikki avgjørt, hvat skal henda. Sagt verður, at eingin avgerð verður tikin, fyrr enn endalig boð koma úr USA.

# Bilar

Nr. 6 • hósdagur • 10. januar 2002 • 76. árg.

# VW Transporter sum kølibilur



*VW Transporter kølibilur*



*Lars Egemose, sølumaður hjá Bilasøluni v/ Øssur Johannesen, sýnir her fram nýggja VW kølibilin. Ein kompressari kølir tað væl bjálvaða rúmið til tann rætta temperaturin*

**Onki er at ivast í at krøvini til tær fyritøkur ið flyta kølivørur gerast alsamt strangari. Í hesum sambandi hevur Bilasølan v. Øssur Johannesen fingið ein VW Transporter kølibil á goymslu. Bilurin er sera væl egnaður til teirra ið flyta vørur sum mugu halda temperaturin undir flutninginum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Uttan sær bilurin út sum ein vanligur Transporter, einasti munurin er at innanfyri rútin í baklúkuni er hvít bjálving. Inni í kassanum, sum er væl bjálvaður allan vegin runt, er ein kompressari ið kann køla rúmið frá +25 stig til +5 stig uppá 35 minuttir. Rúmið er hvítt við jarnplátum í dúrkinum. Eisini er ein hyll, ið er hekt uppá veggin og kann flytast eftir egnum ynski. Møguleiki er eisini fyri at seta fleiri hillar upp.

### Lastar 1100 kg

Bilurin er ein VW Transporter Economy við 75 kh dieselmotori. Totalvektin er 2650 kg og bilurin lastar 1100 kg. Møguleiki er fyri at fáa kølianlegg sett í flestu variantarnar av VW Transporter. Prísurin fyri hendan bilin við kølianleggi er 235.000 kr. + MVG. Lars Egemose, sølumaður hjá Bilasøluni, sigur at øll áhugaði eru vælkomin at venda sær til teirra, fyri at fáa meira at vita um bilin og hvørjir møguleikar eru við einum slíkum kølibili.

# Ov lætt at snýta alkolásini

**Sviar royndarkoyra í hesum døgum tey sokallaðu alkolásini, ið virka soleiðis, at bilurin startar ikki, fyrr enn blást verður í eina slangu, sum situr á instrumentborðinum. Um bilførarin hevur drukkið alkohol, startar bilurin ikki. Saab í Trollhättan, ið hava royndarkoyrt skipanina, eru ikki serliga væl nøgdir. Teir siga, at tað er alt ov lætt at snýta**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Eitt vápn í stríðinum móti rúsdrekkakoyring eru tey sokallaðu alkolásini, har ein sensorur í bilinum registrerar luktin av rúsdrekka og aktiverar eina startsperru. Um lukturin kemur frá einum av teimum ferðandi í bilinum, kann førarin, um hann ikki hevur drukkið, blása í slanguna, so bilurin startar.



*Alkolásini virka soleiðis, at bilførarin skal blása í eina slangu fyri at fáa bilin at starta. Hevur hann drukkið rúsdrekka, startar bilurin ikki.*

### Saab ikki nøgdir

Saab í Trollhättan hava fleiri royndarbilar koyrandi fyri at vita, um hendan skipan er nóð góð at seta í teirra bilar. Men teir eru ikki serliga væl nøgdir við úrslitið, tí um førarin hevur drukkið, kann hann fáa ein edrúan persón at blása í slanguna. Tá bilurin er farin í gongd, kunnu teir býta um pláss.

## Primera í Sounderland



Starvsfólkini á bretsku Nissan bilverksmiðjuni í Sounderland, hátíðarhildu herfyri at fyrsti Nissan Primera 2002, ein silvurgráur sedan, koyrdu út av verksmiðjuni. Fyrireikingarnar byrjaðu fyri 2 árum síðan.

*Kelda: Auto Express*

## Jaguar X-Type



Jaguar X-Type, sum kom á marknaðin í fjør við 4-hjólstrekk sum standard, kemur í ár við eini bíligari útgávu við framhjólstrekk. Hetta er fyrstu ferð í søguni at ein Jaguar fæst við framhjólstrekk.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Peugeot turbodiesel



Peugeot 206 og 307 fáast nú við einum heilt nýggjum 1.4 ltr. turbodiesel motori, sum er ímillum teir mest orkusparandi motorar í sínum klassa.

*Kelda: Auto Express*